# Danir nerta ikki undirgrundina

**Undirgrundaravtalan verður hildin. Føroyingar eiga alla oljuna í undirgrundini, eins og inntøkurnar av henni. Hetta staðfesti danski forsætisráðharrin eftir samráð í Fólkatinginum í gjár**

UNDIRGRUNDARAVTALAN



*Danski forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen, gav í gjár føroyingum vissu fyri, at undirgrundaravtalan ikki verður tikin aftur*

*Mynd: Føroyska Tíðindastovan*

Undirgrundaravtalan er klokkugreið. Hon er í fullum samsvar við heimastýrisskipanina og donsku grundlógina.

Hetta vóru greiðu boðini frá danska forsætisráðharranum, Poul Nyrup Rasmussen, eftir samráð við ávikavist Føroyanevndina og Politisktu – Búskaparligu nevndina hjá danska Fólkatinginum fyrrapartin í gjár.

Poul Nyrup Rasmussen staðfestir kortini, at yvirvaldsrætturin yvir undirgrundini er felags innan fyri ríkið. Men møgulig olja í undirgrundini er ogn hjá føroyingum.

Hóast danski forsætisráðharrin kanska ikki heldur, at talan er um eina serliga góða avtalu, sæð við donskum eygum, so hevur stjórnin als ongar ætlanir um at taka avtaluna upp til nýggjar samráðingar. Og stjórnin hevur greiðan meiriluta aftan fyri seg fyri hesi støðu.

Eisini formaðurin í danska Vinstraflokkinum, Anders Fogh Rasmussen, sum stendur til at gerast næsti forsætisráðharrin í Danmark, ætlar sær at virða undirgrundaravtaluna.

– Har er einki at koma eftir, segði Anders Fogh Rasmussen, tá hann kom út frá samráðnum.

Anders Fogh Rasmussen segði eisini, at tey flestu mugu viðganga, at tað er sjálvsagt, at oljan í føroysku undirgrundini er ogn Føroya fólks. Anders Fogh Rasmussen heldur ikki, at danska stjórnin kann fara inn og pilka við avtaluna, nú meira enn 8 ár eftir, at hon varð undirskrivað.

– Danmark kann ikki fara og føra seg fram sum ein gomul kolonimagt, segði Anders Fogh Rasmussen.

Hóast samráðið í dag og niðurstøðurnar eftir samráðið, so er ikki vist, at málið um undirgrundina er avgreitt frá Fólkatingsins síðu. Peter Skaarup frá danska Fólkaflokkinum er framvegis ikki nøgdur. Tað er hann, sum hevur verið ein tann mest atfinningarsami móti undirgrundaravtaluni.

– Nú haldi eg, at Nyrup skal manna seg upp og krevja, at undirgrundaravtalan verður tikin upp til samráðingar av nýggjum, segði Peter Skaarup. Hann heldur ikki, at talan er um eina góða avtalu, og segði, at Nyrup hevði givið ábendingar um tað sama í samráðnum.

Poul Nyrup Ramussen vil ikki svara, tá hann verður spurdur beinleiðis, um hann heldur avtaluna vera góða. Men hann staðfestir bert, at avtalan er gjørd, og tað ætlar hann ikki at pilka við.

Politiskt – Búskaparliga nevndin hjá Fólkatinginum fer komandi tíðina at viðgera málið um undirgrundina og tey meira enn 2.000 skjølini í málinum nærri. Ikki er óhugsandi, at tað eisini verður ein almenn hoyring, har fyrrverandi forsætisráðharrin, Poul Schlüter, fer at greiða frá.

Poul Nyrup Rasmussen:

## – Vit bíða eftir avkláring úr Føroyum

FULLVELDI

*Magnus Dam, Christiansborg*

– Vit bíða, til politiska støðan í Føroyum er avklárað. Eg skilji á lagnum, at løgmaður er á veg til Føroya nú, og vit bíða bara til vit frætta nærri.

Hetta sigur Poul Nyrup Rasmussen, tá hann verður spurdur um viðmerkingar til broyttu politisku støðuna í Føroyum, nú fólkaatkvøðan 26. mai er avlýst.

Hann bíðar eisini eftir avgerð úr Føroyum, um landsstýrið vil aftur til samráðingarborðið, men stjórnin er altíð til dystin fús, sigur hann.

Spurdur um hann verður fegin, um landsstýrið nú vil samráðast um eina loysn innan fyri ríkisfelagsskapin, sigur hann:

– Um føroyska landsstýrið vil samráðast innan fyri ríkisfelagsskapin, so gera vit tað. Tað er nú upp til landsstýrið og løgtingið at gera av, hvussu føroyingar ætla at farast skal fram.

Poul Nyrup Rasmussen vísir greitt aftur, at hann skal hava framprovokerað støðuna í Føroyum við at siga, at føroyingar bara fáa fýra ára skiftistíð.

– Tað hevði verið skeivt av mær at komið aftan á eina møguliga fólkaatkvøðu og sagt, hvørjar treytirnar verða, sigur Poul Nyrup Rasmussen, forsætisráðharri.

# Vinn ein tarv



*Hesin tvey ára gamli tarvurin kann vinnast í tarvamykjukapping í Klaksvík leygardagin*

Leygardagin verður tarvakapping í Klaksvík. Talan er um eina av teimum tiltiknu tarvamykjukappingunum, har fólk kunnu keypa sær ein fermetur og so vóna, at tarvurin sleppur sær av við sínar leivdir júst á teirra fermetri.

Vinningurin er tvey ára gamli tarvurin, sum verður sleptur inn á fótbóltsvøllin í Klaksvík, og harafturat verða tveir ferðaseðlar til Danmarkar og ein fartelefon burturlutað.

Tarvurin verður sleptur inn á fótbóltsvøllin leygardagin klokkan 14.00, og síðani er tað eisini upp til tarvin at avgera, nær kappingin er lokin,

Partabrøvini til teigarnar á fótbóltsvøllinum fáast til keyps á Hvíthús, á loftinum í KÍ-høllini frá klokkan 19-21, og á skrivstovuni hjá Jákup B. Eisini verða partabrøv koyrd til dyrnar, um fólk ynskja tað.

Tað er Stjørnan, sum stendur fyri hesi kappingini.

